Fylgiskjal 8

Tórshavn 26. mai 2018

**Heilsu- og innlendismálaráðið**

**Att.: Sirið Stenberg landsstýriskvinna**

**Viðvíkjandi:** Løgtingsmál nr. XX/2017: **Løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (náttúrumargfeldislógin)**

Føroya Urtagarðsfelag átalar, at felagið ikki er hoyrt í sambandi uppskot til løgtingslóg um Løgtingsmál nr. XX/2017: Løgtingslóg um fyrisiting av margfeldinum í náttúruni (náttúrumargfeldislógin).

Nústani frætta vit um lógina, og at umleið 40 onnur feløg og stovnar eru eftirspurd, bara ikki urtagarðsfólk og garðyrkisfólk.
Hoyringsfreistin er tí alt ov stutt fyri okkara viðkomandi.

Felagið hevur umboðað hundraðtals urtagarðsáhugaði í fleiri áratíggir. Hesi fólk hava varðað av nøkrum av teimum fáu lendunum, sum ikki eru niðurbitin av seyði.
Umhvørvið hevði verið munandi fátækari uttan hesi gróðrarmiklu friðskjól fyri ung og gomul, menn og serliga kvinnur.
Garðar geva gleði, margfeldi, fuglalív, vakurleika og sálarbót.
Nógv orka verður brúkt av nógvum fólki til planting og røkt av grønmetis- og prýðisplantum.

Hetta krevur sunt, fjølbroytt og egnað tilfar frá góðum plantuveitarum.

Ein tílík lóg kann hugsast at ávirka møguleikarnar hjá hesum áhugaðu munandi, alt eftir hvussu lógin er ætlað at virka.

Tí loyva vit okkum at biðja um eina frágreiðing um, hvussu lógin fer at verða umsitin.
Hvussu eftirlits- og góðkenningararbeiðið verður skipað, hvørjr førleikar verða mettir neyðugir, hvussu ymsir áhugar og sjónarmið verða tikin við í viðgerðini, og hvussu tryggjað verður, at nøkur nytta er í ætlaðu tiltøkunum.

Tá fyrst ein tílík lóg er komin í gildið, er ov seint at umhugsað, um og hvussu hon kann umsitast.

Vinaliga
Føroya Urtagarðsfelag

Hanne-Dot Ludvig, formaður